

**Vegleiðing í samband við andlát og jarðarferðir úr Kirkjuni**

**Sangarar:**
Hesum tekur **Asbjørn Berthelsen** sær av, **tlf. 235258**

**Bønarhald:**
Tá kistan fer úr heiminum, ellisheiminum ella av sjúkrahúsinum og í kikjuna, verður ofta hildið eitt stutt bønarhald í báðum støðum.
Kirkjutænari tekur ímóti, tá kistan kemur í kirkjuna, er ynski um annan persón at hava bønarhaldið, avgerða avvarðandi hetta sjálvi. Oftast verða 2 sálmar sungnir hesa løtuna.

**Ervið:**
Tit eru hjartaliga vælkomin at hava ervið í kirkjukjallaranum. Avvarðandi skulu tá:

- seta seg í samband við **Mariu Blábjørg tlf 444302 ella 251010** ella **Onnu Petersen tlf. 444353 ella 588194**. Tær taka sær av køkinum í kirkjukjallaranum.
- Ynskja tit suppu, syrgja tær fyri innkeypinum og gera suppuna. Avvarðandi gjalda tilfarið.
- Avvarðandi dekka borðini og hava tað við, sum skal vera afturvið einum drekkamunni.
- Avvarðandi biðja sjálvi fólk at servera, umframt eitt fólk at hjálpa til við uppvaskinum. Um tit ynskja hjálp við hesum, ber til at ringja **til Áshild Kristiansen tlf 444621 ella 580025**

Aftaná ervið verður kjallarin ruddaður, borðini vaskaði, gólvið feiða og ruskið burturbeint. Hesum hjálpa tey sum servera til við.
Hava tit tørv á aðrari hjálp ella ráðgeving, tosi við Mariu ella Onnu.

Tað er ókeypis at læna kirkjukjallaran til ervið, men møguleiki er at lata eina gávu til kirkjuna, kirkjan lønar teimum ið starvasti køkinum.

Peningagávan kann latast á konto í **Bank Nordik 6460 - 7977087**

Tær kærastu heilsur
Prestur og kirkjuráðið